*HVALBIAR KOMMUNA*
*TLF 375033*
*FO-850 HVALBA*

*Hvalba, hin 20. nov. 2007*

*Føroya Løgting*
*Tinghúsvegur 1 - 3*
*Postboks 208*
*FO-110 Tórshavn*

*Viðvíkjandi teymi úr nýggja Hvalbiar tunnilinum út í Vatnsdal!*

*Viðlagda áheitan frá hagapørtunum:*
*Hamrahaga, Innara Parti*
*Hamrahaga, Uttara Parti*
*Knúkahaga, Innara Parti*
*Knúkahaga, Uttara Parti*
*viðv. at fáa teym úr nýggja Hvalbiar tunnilinum út í Vatnsdal, varð viðgjørd á fundi 20.11.07.*

*Samtykt varð at taka undir við og viðmæla áheitanini, at teymur verður lagdur úr nýggja Hvalbiar tunnilinum út í Vatnsdal og senda áheitanina til Føroya Løgting til víðari viðgerð.*

*Hervið verður sagt frá hesum.*

*Virðingarmest*

*v. k.* Levi Niclasen

*Levi Niclasen, borgarstjóri*
***HVALBIAR KOMMUNA***
***FO-850 HVALBA***

*Viðlagt: Áheitan og fylgiskriv*
*Avrit av skrivinum er sent Vinnumálaráðnum og Landsverki*

29. NOV. 2007

29

Løgtingið j. nr. 10-20060001

Hvalba, tann 29/10-2007

Hvalbiar Kommuna
850 Hvalba

**Áheitan á Hvalbiar Kommunu viðvíkjandi teym úr nýggja Hvalbiar tunnilinum út í Vatnsdal.**

Hagastýrini umboðandi niðanfyri nevndu hagapartar: Hamrahagi innari partur, Hamrahagi uttari partur, Knúkahagi innari partur og Knúkahagi uttari partur heita hervið á Hvalbiar Bygdarráð, nú talan er um at gera nýggjan Hvalbiar tunnil millum Hvalba og Trongisvág í komandi tíð at senda áheita á Landsverk um at taka við í projektið ein tunnillsteym út í Vatnsdal.
Tað er okkum ikki kunnugt í løtini, hvussu langur hesin teymur verður ella hvussu stórur meirkostnaðurin av hesin teymi verður, men tað er allneyðugt nú at taka hetta við í projektið, um hetta nakrantíð skal verða verðinleiki..

Niðanfyri nevndu halda, at tað ikki er eittt órímuligt krav til Bygdarráðið at virka kraftiga fyri, at vit fáa við í tunnilsgerðina Hvalba-Trongisvág tunnilssamband út í Vatnsdal.
Vit vísa á, at aðrastaðir í landinum – eitt nú Kallsoy – eru teymar gjørdir til avsíð støð/dalar har ringt er at koma til at røkja seyðahaldið. Víst verður til viðlagda skjal hesum viðvíkjandi.

Vit vóna og vænta, at Hvalbiar Bygdarráð tekur omanfyri nevndu ynski okkara til eftirtektar og ger alt sum er møguligt fyri at ávirka Landsverk at taka við í Tunnilsprojektið tunnilssamband út í Vatnsdal.
Við vón um um at bygdarráðið tekur væl undir við áheitan okkara viðvíkjandi tunnilssambandinum út í Vatnsdal.

Við hávirðing.
Vegna hagapartarnar:

| Hagastýrið fyri Hamrahaga Innari Partur | Hagastýrið fyri Hamrahaga Uttari Partur | Knúkahagi Innari Partur | Knúkahagi Uttari Partur |
|---|---|---|---|
| Martin í Nesi | Tryggvi Gudmundarson | Birgir Tofthegyggj | Páuli Thomsen |
| Alvur Berg | Meinved Mortensen | | |
| Manne Næs | Mannbjørn Holm | | |
| Regin Nónstein | | | |

Fylgiskriv.

Víst verður til skriv dagfest 29/10-2007 til Hvalbiar Kommunu: Tunnilssamband út í Vatnsdal.

Um niðanfyri nevndu hagapartar verður upplýst samb. Innan- og Uttangarðsútskifting og matrikulering av markatalsbygdini Hvalba, at:

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Hamrahagi, | Innari Partur | er | 4 mk og 02 gl. | og eru | 7 eigarar. |
| Hamrahagi, | Uttari Partur | er | 8 mk. | og eru | 13 eigarar |
| Knúkhagi, | Innari Partur | er | 3 mk. | og er | 1 eigari |
| Knúkhagi, | Uttari Partur | er | 3 mk. | og eru | 4 eigarar. |

Sum øllum kunnugt, so liggja hesir hagapartar ógvuliga avsíðis og eru tí sera ringir at røkta hjá eigarunum. Hagapartarnir eru ringir vetrarhagar og tí er neyðugt at taka seyð heim til hús um vetrarnar.
Tá kavavetrar hava verið, hevur tað verið torført at bera hoyggj út til seyðin, tí man er noyddur at fara upp um fjøll fyri at koma til seyðin
Hetta eru hagapartar, sum tað tekur millum 1 og 2 tímar at koma til.
Á heystardegi verður fyri Hamrahaga Innara Part allur skurðurin á heystardegi rikin ávegis til Trongisvágs, sum er tann frægasta leiðin heim og tekur tað millum 2 og 3 tímar at reka.
Fyri hinar hagapartarnar verður skurðurin á heystardegi rikin í Tjørnines og síðan fluttur við báti inn til Hvalbiar.
Ì Tjørninesi eru ábøtur gjørdar, so at leggjast kann at í góðum veðri og stíggjurin niður í Tjørnines er gjørdur so frægur, at gangandi er niður
Tá ongin annar betri máti er at fáa skurðseyðin heim til húsar, so hava menn gjørt atløgumøguleikar so frægar har, at hetta ber til, men veður og vindur skal verða til vildar fyri at hetta skal bera til.
Á heystardegi er veðrið ikki altíð til vildar, og tá hagapartarnir liggja so avsíðis, so er altíð torført í dag at fáa rakstur og annað at passa saman.
Ein annar trupulleiki, sum meir og meir gerst galdandi, tað gerst torførari og torførari at røkja hagapartarnar við tað at áhugin hjá komandi ættarliði, sum skal taka við gerst meir og meir ótíðarhóskandi. Fjarstøðan og møguleikin at koma til hagapartarnar er so trupul.
Teir gomlu eigararnir vistu sær einki annað enn at stríðast og nýta teir møguleikar sum vóru til taks tá, men tíðin í dag krevur nakað annað. Fylgir man ikki við, so dettur alt niður fyri og tað yngra ættarliðið hevur ongan áhuga fyri hesum aldargamla at hava við seyð at gera. Um vit ikki røkja okkara skyldur mótvegis komandi ættarliðið, so fáa vit ein stóran trupulleika.
Tá man nevnir "Flekk" og "Káragjógv,"so vekjast tankarnar, tí tað vóru hesi støðini, sum man frá teim omanfyri nevndu hagapørtum róku skurðseyðin heim. Støðini vóru ikki tey bestu at reka skurð niður gjøgnum – serliga Flekkur – og seyðurin hevði tað ikki altíð so lætt.
Allur bati bøtur, verður sagt, og soleiðis eisini, tá man gekk frá hesum støðum og fóru at brúka Tjørnines fyri teir uttastu hagapartarnar og til Trongisvágs fyri Hamrahaga innara part.

Verður Tunnil gjørdur út á Hamrar/Knúkarnar, tá gerast møguleikarnar hjá komandi ættarliðið avberað góðir at búleikast har úti, og menn fáa nýggjan íblástur og møguleika at røkta hagapartarnar.
Tað verður ofta tikið til "ferðavinnan". Her er eisini ein møguleiki at samskipa henda møguleika. Við vón um at allar góðar kreftir verða samskipaðar og soleiðis fæst nakað gott burturúr hesi søk okkara.